# ***Túrfrágreiðing***

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 15. - 19. September 2000

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*September 15th - 19th 2000*

Eyðfinn Magnussen



NVDRit 2000:2

SERRITGERÐ Thesis
TØKNIFRÁGREIÐING Technical Report
UNDIRVÍSINGARTILFAR Teaching Material
UPPRIT Notes

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka**
**15 – 19. september 2000**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*September 15th 19th 2000*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type *Tøknifrágreiðing*/Technical Report

*NVD*Rit 2000:2
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk frá FRS:** Arnhold Henriksen, Rógvi Mouritsen, Mourits Mohr Joensenn og Eyðfinn Magnussen

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologini hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini varð hugt at teimum oceanografisku viðurskiftunum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breidlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Minilog temperatur- og dýpdarmátari, Seabird-CTD og WP-2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini hóshvøldið 14. september kl. 21.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin á Føroyabanka 15. september kl. 04.02. Seinasta støðin varð tikin 19. september kl. 07.50. Túrurin samsvaraði ikki heilt við ætlanina. Týsmorgunin 19. september var veðrið vánaligt. Tá vóru 3 støðir eftir, men eftir at hava tikið ta fyrstu støðina varð avgjørt at gevast vegna veður. Støðirnar, ið ikki vórðu tiknar vóru 1722 og 1708. Eitt tov taldi ikki við (00680037). Hetta komst av, at ein lúka í posapavninum fór upp, og ein stórur partur av veiðuni endaði á fabrikksdekkinum. Veiðan í hesum var meginpartur hvalspýggj, uml. 10 tons. Sostatt vórðu 26 brúkuligar trolstøðir og 12 CTD- og djóraætisstøðir tiknar.

**Prøvataking:** Hesir prøvar vórðu tiknir:

| Fiskaslag | Nytrur | Magar |
|---|---|---|
| Toskur | 279 | 35 |
| Hýsa | 381 | 58 |
| Upsi | 255 | 41 |
| **Tilsamans** | **915** | **134** |

Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka 400 nytrur av hvørjum av omanfyri nevndu fiskasløgum. Hetta var tó ikki møguligt, av tí at ov lítið var at fáa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu sorteraðir umborð. Mátingarnar frá temperaturmátaranum á trolinum eru upparbeidd. Úrslitini eru klár og verða víst í hesi frágreiðingini. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættlisin og nytrurnar klárar at leggja upp.

**Fyribils úrslit og endalig úrslit:**

Toskurin í minkin meðan hýsan og upsin eru í vøkstri.

**Veiðan:** Í talvu 1 er víst samlaða veiða á túrinum og tað, ið landað var á uppboðssøluni. Fingin vórðu íalt 35 fiskasløg. Mest var fingið av hýsu, toski og upsa. Samanborið við undanfarin ár (talva 2 og mynd 1), er hýsan og upsin í vøkstri, meðan toskurin er í minking. Miðalveiðan av toski hendan túrin var 83 kg pr tov, samanborið við 318 kg pr tov í 1997. Silvurmurtur varð hendan túrin fingin á fleiri støðum enn vanligt (5 íalt). Hesi seinastu árini hevur hesin fiskurin bert verið at fingið í teimum vestastu puntunum á Bankanum. Eisini var hvítingur fingin á bankanum: Hetta er óvanligt

**Hiti:** Á mynd 2 er miðalhitin á botni vístur fyri hvørt hál. Miðaltølini eru hitin mátaður niðri við botnin, meðan tovað verður. Á myndini sæst, at sjógvurin er heitastur á tí grunna, og kølnar so út móti kantinum.

| Fiska Nr. | Fiskaslag | Samlað veiða (kg) | Landað veiða (kg) |
|---|---|---|---|
| | HÝSA | 11.343 | 5.281 |
| | TOSKUR | 2.151 | 1.121 |
| | UPSI | 1.962 | 1.518 |
| | GULLAKSUR | 1.562 | |
| | LOLIGO | 1.324 | |
| | HAVMÚS | 1.135 | |
| | SVARTKJAFTUR | 827 | |
| | KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 213 | |
| | S. VIVIPARUS | 158 | |
| | LONGA | 64 | 50 |
| | S. MARINUS | 64 | 74 |
| | HÁKELLING | 50 | |
| | ROSSAMAKRELUR | 49 | |
| | GLÝSUFISKUR | 39 | |
| | HAVTASKA | 38 | 15 |
| | BLÁLONGA | 29 | 15 |
| | AGNHØEGGUSLOKKUR | 24 | |
| | HVÍTINGSBRÓÐIR | 24 | |
| | KNURRHANI | 20 | |
| | HVÍTINGUR | 17 | |
| | TUNGA | 17 | 8 |
| | LÍTLA BROSMA | 15 | |
| | KALVI | 12 | |
| | S. MENTELLA | 11 | |
| | BROSMA | 9 | |
| | SANDSPRØKA | 8 | |
| | LÁLLA | 7 | |
| | SILVUR MURTUR | 7 | |
| | HVASSASPREK | 4 | |
| | STINGLAKSUR | 4 | |
| | BLÁRIDDARI | 3 | |
| | SVARTFISKUR | 2 | |
| | BÚKSVARTI HÁVUR | 2 | |
| | GLASKVOYSA | 1 | |
| | SMASKRUBBUTA LANGASPORL | 1 | |
| Tilsamans | | 21.196 | 8.082 |

***Talva 1**: Veiðan frá Føroyabankatúrinum 15.–19. september 2000.*

| Turnr. | Dagar | Máni Ár | Tal av tovum | Toskur | | Hýsa | | Upsi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov |
| 9164 | 2-4 | sept 1991 | 11 | 270 | 25 | 178 | 16 | 36 | 3 |
| 9256 | 24-25 | juli 1992 | 2 | 189 | 95 | 17 | 9 | 15 | 8 |
| 9668 | 6-10 | sept 1996 | 33 | 6.359 | 193 | 6.303 | 191 | 170 | 5 |
| 9772 | 4-8 | sept 1997 | 29 | 9.210 | 318 | 8.311 | 287 | 2.415 | 83 |
| 9872 | 18-22 | sept 1998 | 29 | 7.821 | 270 | 8.905 | 307 | 1.034 | 36 |
| 9972 | 17-21 | sept 1999 | 29 | 3.132 | 108 | 10.694 | 369 | 1.401 | 48 |
| 0068 | 15-19 | sept 2000 | 26 | 2.151 | 83 | 11.343 | 436 | 1.962 | 75 |

***Talva 2:*** *Veiðan (kg) av toski, hýsu og upsa í heyst-yvirliistrolingunum á Føroyabanka.*




***Mynd 1*** *Miðal veiða (kg/tov) av toski, hýsu og upsa í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka.*




*Mynd 2*: *Miðalhitin við botnin fyri hvørt tov mátaður í tíðarskeiðnum 15-19. september 2000.*

**Viðmerkingar:** Ongin

Tórshavn 26. september 2000

______________________________

Eyðfinn Magnussen